UTTAN ÚR HEIMI

## Krevja endurgjald eftir flóðalduna

Sakførarar í Eysturríki hava boðað frá, at teir fara at leggja sak ímóti einum amerikonskum ávaringarstovni, teilendskum myndugleikum og einari hotellfyritøku í sambandi viðflóðalduna annan jóladag í fjør. Sakførararnir, sum umboða 14 eysturríkarar og fimm týskarar, siga, at tey saksøktu mugu átaka sær ein part av ábyrgdini av skaðanum, sum flóðaldan elvdi.

Ed Fagan, sum er ein av sakførarunum aftan fyri málið, sigur við AP, at amerikanski ávaringarstovnurin Pacific Tsunami Warning Center á Hawaii-oyggjunum varnaðist tann harða jarðskjálvtan, og hann krevur tí, at stovnurin letur rættinum øll skjøl, sum hava samband við skjálvtan og flóðalduna. Í Teilandi ætla sakførararnir at stevna sjóumsitingini, tí hon boðaði ikki frá, at ein flóðalda var á veg.

Hotellfyritøkan, sum verður stevnd, eitur Accor Hotel. Hon átti millum annað eitt hotel í frítíðarbýnum Khao Lak, sum varð sera meint raktur av flóðalduni.

## Minst 12 ára fongsul

Fyrrverandi amerikanski presturin Paul Shanley varð týsdagin dømdur minst tólv ára fongsul fyri at hava neyðtikið ein drong.

Undir rættarmálinum ímóti tí 74 ára gamla, katólska prestinum kom fram, at hann neyðtók ein seks ára gamlan drong fleiri ferðir í áttatiárunum. Tá arbeiddi presturin í einari kirkju í Boston og fekst millum annað við børn og ungfólk, sum høvdu ymsar trupulleikar í uppvøkstrinum.

Í dag er tann neyðtikni drongurin 27 ára gamal, og fyri tveimum árum síðani fór hann til løgregluna og meldaði prestin. Síðani hava fleiri aðrir menn boðað frá, at teir vórðu eisini fyri kynsligum ágangi í katólsku kirkjuni í Boston og aðrastaðni í USA. Kirkjan hevur biðið um umbering fyri tað, sum hendi, og fleiri prestar eru frákoyrdir. Samstundis kannar løgreglan fleiri skuldsetingar.

## Ferjur í Flógvan

Danska reiðaríið Scandlines hevur selt tvær gamlar ferjur, sum í framtíðini skulu sigla í Persaflógvanum.

Talan er um ferjurnar "Dronning Margrethe II" og "Rúgen", sum eru meiri enn 30 ára gamlar. Tað er reiðaríið Marco Shipping í Dubai hevur keypt skipini. Hetta felagið røkur rutusamband ímillum Dubai og iraksku býirnar Basra og Umm Qasr, skrivar Politiken.

Tær báðar ferjurnar liggja í løtuni í Nakskov, har tær verða riggaðar til, áðrenn tær skulu í Flógvan.

## Sjáldsamur fiskur

Tveir norskir stuttleikafiskarar gløddu við, tá teir nú um dagarnar vóru í Høylandssundinum í Suðurhordalandi eftir nøkrum gørnum, sum teir høvdu havt standandi har.

Í einum av gørnunum var ein fiskur, sum teir báðir menninir ongantíð høvdu sæð fyrr. Tá teir komu aftur til húsa, settu teir seg at hyggja í eina bók við alskyns fiskasløgum, og har sóu teir, at tað var ein St. Pætursfiskur, sum teir høvdu fingið.

Bergens Tidende skrivar, at St. Pætursfiskur er vanligur í Miðjarðarhavinum, og at italiumenn eta nógv av hesum fiskaslagnum. Hinvegin er hann sjáldsamur her norðuri á okkara leiðum, og í Noregi verður hildið, at veðurlagsbroytingarnar við lýggjum vetri, illveðri og lýggjum sjógvi hava gjørt, at hetta fiskaslagið nú eisini hevur leitað sær norðureftir.

# Sponsku sólstrendurnar kunnu hvørva

**Tann veksandi hitin á Jørðini kann hava við sær, at tær væl umtóktu sponsku sólstrendurnar fara at hvørva**

VEÐURLAG
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tey seinastu hundrað árini er meðalhitin í Spania vaksin hálvtannað stig. Tað er meiri enn tvær ferðir meiri enn vøksturin í heiminum annars og umleið eitt hálvt stig oman fyri hitavøksturin í Evropa.

Nú ávarar spanska umhvørvismálaráðið um avleiðingarnar. Ráðið hevur fingið eina frágreiðing, sum 50 granskarar hava skrivað, og sambært Christinu Narbona, umhvørvismálaráðharra er frágreiðingin óhugnaligur lesnaður.

Granskararnir siga, at tey seinastu 30 árini í hesari øldini kann summarhitin í Spania fara upp um 50 stig. Teir hava eisini roknað út, at innan aldarskiftið fer vatnsstøðan í høvunum at hækka umleið 70 centimetrar, og at tað fer at forkoma nógvum av teimum væl umtóktu sólstrondunum.

Christina Narbona sigur við AP, at øll hava skyldu til at gera nakað við veðurlagsbroytingarnar. Tað krevur tøknilig framstig, men tað krevur eisini, at vit broyta okkara vanar, sigur ráðharrin.

# Blair klárt á odda

**Í Bretlandi fær stjórnarflokkurin hjá forsætisráðharranum altsamt støri undirtøku, nú valið nærkast**

BRETLAND
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Enn hevur Tony Blair ikki kunngjørt, nær bretar skulu velja nýtt Parlament, men hildið verður, at valið verður eina ferð tíðliga í mei.

Forsætisráðharrin ger kanska eisini rætt við at bíða við at kunngera valdagin, tí sambært einari meiningakanning í blaðnum The Independent fær flokkur hansara, Labour, altsamt størri undirtøku ímillum veljararnar.

Kanningin, sum stóð í blaðnum í gjár, gevur Labour 42 prosent av atkvøðunum, meðan tann konservativi andstøðuflokkurin fær 30 prosent. Tann triði stóri flokkurin, Teir Liberalu Demokratrnir, fær 18 prosent. Hjá Labour er framgongdin fýra prosentstig samanborið við eina kanning í síðsta mánað, meðan tey konservativu hava mist tvey prosentstig í sama tíðarskeiði.

Sambært The Independent hevur stjórnarflokkurin ikki havt so stóra undirtøku ímillum veljararnar síðani í mei í 2003.



*Tað tykist vist, at Tony Blair fer at vinna parlamentsvalið, sum væntandi verður í mei*

*Mynd: Reuters*

# Jarðskjálvti skakaði Tokyo

JARÐSKJÁLVTI

Ein jarðskjálvti, sum bleiv máldur til 5,4 á Richterstiganum, var í japanska høvuðsstaðnum Tokyo tíðliga gjáramorgunin. Meiri enn 30 fólk fingu skaða.

Japanski jarðfrøðistovnurin segði, at miðdepilin í skjálvtanum var í landspartinum Ibaraki norðan fyri Tokyo.

Skjálvtin merktist væl í høvuðsstaðnum, og myndugleikarnir gjørdu av at steingja fleiri vegir og jarnbreytir norðan fyri býin.